samleikin

# Soleiðis gert tú Windows telduna klára til geyman

Áðrenn tú fert undir at brúka Samleikan á geyma, skalt tú gera telduna klára.
Tú skrásetur Samleikan hjá brúkaratænastuni á Staravegi 9 í Havn.

Niðanfyri sært tú, hvussu tú gert telduna klára til at brúka Samleika geyman.
GG: Teldan skal ikki hava eldri stýrisskipan enn Windows 10.

**STIG 1**

Far inn í Microsoft Store á Windows telduni.

Tú finnur Microsoft Store við at skriva navnið í leititeigin niðast í vinstra horni.

**STIG 2**

Í Microsoft Store skrivar tú Nexus Smart ID í leititeigin í høgra horni í erva.




Trýst á ókeypis appina og tak hana niður á telduna.

**STIG 3**

Ein skermmynd kemur fram, ið biður teg rita inn. Tú kanst trýsta á nei og halda fram. Appin verður tikin niður á telduna.

**STIG 4**

Tá ið niðurtøkan er liðug, kanst tú lata vindeygað aftur og rita inn við geymanum.

Á www.samleikin.fo finnur tú videovegleiðingar um at rita inn við geymanum og góð ráð um, hvussu tú brúkar Samleikan.